# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Frá Rio til Keypmannhavn

Eitt av málunum, sum hevur fingið serstaka stóra umrøðu í altjóða fjølmiðlunum og á ymsu politisku og samfelagsligu pallunum kring allan heim seinastu árini, eru veðurlagsbroytingarnar. Tað var ikki minst stóra heimráðstevnan um umhvørvi og dálking í Rio í Brasilia, sum setti gongd á orðaskiftið, hvussu vit forða fyri, at alt heimsumhvørvið verður meira dálkað. Síðani tá hevur verið enn ein stór ráðstevna hildin í Kyoto í Japan, har tað vórðu tiknar meira ítøkiligar avgerðir um at lække útlátið av $CO_2$ í atmosferuna. Í hesum sambandi hava føroyingar tikið fyrivarni, men kortini hava nógvar røddir verið frammi um, at Føroyar eins og onnur lond eiga at átaka sær sín partur av hesum skyldum.

Nú er so avgjørt, at Danmark skal hýsa tríðju stóru umhvørvis- og veðurlagsráðstevnuni av hesum slag. Hetta verður í 2009. Eingin ivi er um, at hetta hevur nógv at siga fyri Danmark, tí landið er millum tey fremstu í heiminum við bæði nýhugsan og eisini framleiðslu av útbúnaði so sum vindmyllum, sum skulu minka um samlaða útlátið av vandamiklum gassum. At ráðstevnan verður nettupp í Danmark, sum er undangonguland á mongum av økjunum at minka um nýtslu av vandamiklum gassum frá fossilum brennievnum og hevur gjørt stórar íløgur í varandi orkukeldur, er eitt sera gott stig, og í hesum høpi slepst ikki undan at hugsa um aðrar partar av danska ríkinum, Føroyar og Grønland. Grønland er á breddanum nærum hvønn dag í altjóða pressuni sum eitt hitt besta dømið um, hvussu broytingar í verðurlagnum av mannaávum síggjast her og nú, har ísurin bráðnar og djóralívið so sum ísbjarnirnar eru hóttar. Føroyar liggja mitt í Atlantshavinum og tí sera viðkvæmar, hvat havstreymunum viðvíkja. Her hevur ein av okkara fremstu havgranskarum, Bogi Hansen, gjørt eitt slóðbrótandi arbeiði til tess at vísa møguligan samanhang millum yvirupphiting og broytt viðurskifti í høvunum. Hinvegin hevur sami granskari ferð eftir ferð eisini funnist at føroyskum myndugleikum fyri ikki at hava viljað góðtikið Kyotosáttmálan.

Nú verður so triðja ráðstevnan í Danmark og hetta eigur at fáa okkara myndugleikar at handfara hetta málið við enn størri álvara. Eingin ivi er um, nú Danmark er vertur fyri hesi ráðstevnuni, at ljóskastarin so ella so eisini fer at verða settur á hinar partarnar av Ríkisfelagsskapinum – á Grønland sum eitt dømi um, hvussu upphitingin ger ilt, og á Føroyar, sum dømi um eitt øki, ið ikki enn hevur viljað samtykt Kyotosáttmálan. Tað er greitt, at vit hava fingið nakað at hugsa um til ta tíð. Kanska vit skulu fáa okkara viðurkifti uppá pláss í góðari tíð , og vónandi kunnu vit eisini geva okkara íkast til komandi ráðstevnuna við tí gransking, sum okkara egnu fólk hava gjørt á økinum. So Føroyar koma at gerast partur av hesi stóru ráðstevnu so ella so – fyri tað góða og fyri tað ringa. Enn eru stundir at taka í egnan barm. Hetta landsstýrið hevur eina stóra ábyrgd á hesum øki og vónandi fer júst hetta málið at seta krøv til eitt komandi nýtt landsstýri.

**Sosialurin**

## Almenn áheitan til Amnesty International, Føroya deild

10. apríl visti danska tíðindablaðið, Kristelig Dagblad at siga frá, at bretska deildin av Amnesty International hevur tikið avgerð um at arbeiða fyri at fáa Amnesty International at meta fosturtøku sum ein mannarætt. AI-UK ætlar við hesum at birta upp undir kjakið, tá ið ráðsfundurin hjá Amnesty International verður hildin í Meksiko seinni í ár. Endaliga málið er at Amnesty International skal samtykkja hetta uppískoyti á altjóða støði.

Amnesty International er ein viðurkendur altjóða felagsskapur, ið hevur gjørt stóran mun, tá tað kemur til at verja mannrættindi og gera vart við órætt, ið verður framdur móti menniskjum vegna politisk, religiøs, etnisk – og onnur líknandi viðurskifti. Amnesty International er verjan og røddin hjá tí veika og lítla, mótvegis tí kúgandi og sterka.

Tí harmar tað okkum almikið, at Amnesty nú umhugsar at arbeiða við einum máli, har tað ikki er tann veikasti parturin, ið skal verjast. Vit viðurkenna at mangar kvinnur eru fyri ringari viðferð, og verða misnýttar og neyðtiknar, og hetta skal undir ongum umstøðum góðtakast. Men er tað ófødda barnið ikki ein enn veikari partur av hesum málinum? Hvør skal vera røddin, ið tosar um verju fyri hendan partin?

Vit meta tað vera ábyrgdarleyst, miðvíst at arbeiða fyri at geva rætt til fosturtøku, uttan at fyrihalda seg til rættindini hjá tí ófødda barninum. Eisini hóast talan er um ógvusligar umstøður, har kvinnur hava verið fyri ræðuligum hendingum. Tann mest óseki parturin er hóast alt barnið. Um man velur at arbeiða fyri fosturtøku, so má man eisini fyrihalda seg til rættindini hjá hesum børnum, og gera eina niðurstøðu um tey yvirhøvur hava nøkur rættindi.

Eins og Amnesty International, trúgva vit at eingin hevur rætt til at taka lívið hjá øðrum. Men vit trúgva at eisini hesi grundleggjandi rættindi til lív eiga at umfata tey, ið hava størstan tørv á verju og umsorgan okkara – tey ið enn ikki eru borin í heim.

Vit trúgva, at tað er skeivt, bæði útfrá einum etiskum og einum samfelagsligum sjónarmiði, at fremja fosturtøku, uttan tá ið lív stendur móti lívi. Vit meta at áhaldandi ágangurin móti óføddu børnunum verður til einki minni enn eina vanlagnu fyri ymisku samfeløgini, við tað at vit ræna frá okkum sjálvum tað dýrasta tilfeingi vit eiga.

Við hesum vilja vit staðiliga heita á Amnesty International í Føroyum um ikki at stuðla avgerðini, ið bretar hava tikið, men heldur gera sína ávirkan galdandi og taka stig til at verja ófødda barni, og harvið halda áfram við tí arbeiði, ið Amnesty International hevur gjørt fyri at verja lív og rættindi menniskjans um allan heim.

Við bestu heilsanum, og ynski um ein góðan ársaðalfund

**Ung fyri Miðflokkin**
**Arni Abrahamsen**
**Formaður**

**Tóri Højgaard**
**Næstformaður**

## Tryggingarfelagið Føroyar vil *tryggja* javnstøðu

TÍÐINDASKRIV

Kveik.fo er nýggjur portalur, ið hevur sum endamál at gera kvinnuliga tilfeingið í føroyska samfelagnum meira sjónligt, soleiðis at lættari verður at fáa gagnnýtt hetta týðandi vitanartilfeingið í samfelagnum. Harvið vil portalurin kveikja undir størri javnstøðu.

Tryggingarfelagið Føroyar er – saman við EIK – høvuðsstuðul hjá hesum portali.

**Javnstøða í vinnulívinum versnar**

Javnstøðan í føroyskum fyritøkum er versnað seinastu árini. Hetta vísir kanning, ið Vinnuvitan lat gera herfyri. Meðan tað í 2005 vóru uml. 1800 mannligir og 300 kvinnuligir stjórar í øllum smáparta- og partafeløgum í Føroyum, so er hetta talið í 2007 broytt til 2300 mannligir og 300 kvinnuligir stjórar tvs. 88,5% menn og 11,5% kvinnur. Verður hugt at nevndarsessum í føroyskum fyritøkum er kynsbýtið nærum eins skeivt.

**Vinnan missur vitan og kappingarføri**

- Nýggjasta kanningin av javnstøðuni í føroyskum vinnulívi vísir, at føroyskt vinnulív ikki í nóg stóran mun gagnnýtir alt tað føroyska vitanartilfeingið og harvið missir atgongd til týðandi nýhugsan, fjølbroytni og vitan. Hetta merkir í seinasta enda, at vit ikki eru so kappingarfør sum vit kundu verið, og er hetta stórt spell. Hetta er eisini óneyðugt, tí í Føroyum eru hópurin av vælkvalifiseraðum kvinnum", sigur Edvard Heen, varastjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

**Kveik.fo kveikja javnstøðu og framburð**

- Kveik.fo kann kveikja undir, at føroyskt vinnulív og føroyska samfelagið í størri mun fara at gagnnýta alt tað føroyska vitanartilfeingið og harvið økja um vøksturin og betra kappingarførið – og vil Tryggingarfelagið Føroyar við stuðli sínum verða við til at tryggja at so verður. Tað fegnast vit sjálvandi um, sigur Edvard Heen, varastjóri í Tryggingarfelagnum Føroyar.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Eyðhild Jacobsen eydhild@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.